# Rasmussen knústi feltið

Michael Rasmussen, sum nú aftur er farin at súkkla eftir doping-gøluna í Tour de France í fjør, kappast í hesum døgum í Vuelta a Puebla í Mexico. Og her knústi hann feltið, tá hann a næstu etapuni súkklaði 110 kilometra langa teinin í mexicansku fjøllunum nærum 10 minuttir skjótari enn næsti súkklarin. Við hesum hevur Rasmussen lagt seg greitt á odda í samlaðu støðuni, og útlitini fyri sigri gerast neyvan minni av, at bæði fjórða og fimta etapan eisini eru í fjøllunum.



# Annika aftur til Stjørnuna

Stjørnan hevur boðað frá, at felagið hevur gjørt avtalu við Anniku og Duritu Ljósstein. Durita hevur spælt við Stjørnuni seinastu tvey kappingarárini, eftir at hon hevði verið í Danmark undan hesum, og nú hevur hon tikið avgerð um at halda fram. 35 ára gamla Annika Ljósstein spældi í fjør við Neistanum, men nú er líkt til, at hon fer at enda hondbóltsleiðina í barndómsfelagnum, har hon áður hevur verið við til at vinna fleiri meistaraheiti.




**Christian Lamhauge Holst hevði at kalla ógjørligar arbeiðsumstøður í føroyska álopinum, men hann arbeiddi fyri fleiri, áðrenn han læt seg skifta út við Andras Lava Olsen, sum at enda pyntaði um úrslitið**
Mynd: Polfoto

um úrslitið, tá hann staðfesti, at accelerationin veruliga er í altjóða flokki. Og fyri tað eisini evnini til ískalt at avslutta, hóast vinkulin var vorðin nakað trupul.

Hetta seinasta fløvaði nakað á rennváta vøllinum, sum ikki hóvaði okkara monnum serliga væl. Men tað fekk ikki strikað myndina um, at vit leygarkvøldið sóu eitt føroyskt landslið, sum fyri fyrstu ferð í eini tvey ár ikki var heilt uppi at ringja í verjupartinum.

Í so máta var úrslitið betur enn avrikið. Men skal hugsingur vera um at fáa eitt betur úrslit móti Litava mikukvøldið, er neyðugt við øðrum bollum í suppuni – frá fyrsta bríksli.

### Missa lyklaspælarar

Nakað annað er so staðfestingin av, at tað verður uttan triggjar vanliga mest arbeiðssomu spælarunum, at føroyska liðið skal standa seg. Hóast gula kortið til Atla Danielsen var mest sum vanvittuga bíligt, so kostar hetta leikbann, og tað sama gjørdu kortini hjá Boga Løki og Fróða Benjaminsen.

Vanliga eru júst hesir triggir millum teirra, sum dekka størst arbeiðsareal á føroyska liðnum, og tí verður høvuðbrýggið helst stórt hjá Brian Kerr og hansara monnum komandi dagarnar.

Tað kann tó staðfestast, at innskifti Andreas Lava Olsen prógvaði, at hann er førur fyri at byrja inni á toppinum, og so er upplagt, at Christian Lamhauge Holst verður fluttur aftur í leiklutin sum offensivur miðvallari, har hann í størri mun kann søkja aftur til bóltmóttøku.

Á høgra kanti er upplagt, at altíð arbeiðssami Jákup á Borg fær møguleikan, sum hann ikki fekk hesaferð, hóast hann tóktist vera upplagdur útskiftingarmøguleiki. Og so er spurningurin, hvør triði maðurin á miðvøllinum verður. Arbeiðssemi og nærdystarstyrkin hjá Fróða Benjaminsen hevur verið mest sum altavgerandi táttur í góðu úrslitunum, sum landslið okkara hevur fingið í fleiri av farnu dystunum, og tí verður arvurin serstakliga tungur at lyfta, hvør so enn skal lyfta hann.

Undir øllum umstøðum stendur greitt, at fimm mans fáa landsliðsboð, nú hópurin skal økjast, og spennandi verður at vita, um ikki onkur sannur arbeiðshestur verður at síggja millum hesar.

| Fakta | Eysturríki | | Føroyar | |
|---|---|---|---|---|
| | *1. hálvleikur* | *2. hálvleikur* | *1. hálvleikur* | *2. hálvleikur* |
| **Málspørk** | 4 | 3 | 8 | 3 |
| **Frispørk** | 4 | 10 | 10 | 9 |
| **Innkøst** | 10 | 9 | 7 | 4 |
| **Hornaspørk** | 4 | 6 | 0 | 3 |
| **Brotsspørk** | 1 | 0 | 0 | 0 |
| **Rangstøður** | 1 | 1 | 0 | 1 |
| **Skot á mál** | 9 | 5 | 3 | 2 |
| **- innanfyri** | 7 | 3 | 1 | 1 |
| **- uttanfyri** | 2 | 2 | 2 | 1 |
| **Mál** | 2 | 1 | 0 | 1 |
| **Gul kort** | 0 | 2 | 0 | 4 |
| **Reyð kort** | 0 | 0 | 0 | 0 |

**Eysturíki-Føroyar 3-1 (2-0)**
HM undankappingardystur á UPC Arena í Graz leygardagin 5. September 2009 kl. 20.30.
**Dómarakvartett av Malta:** Marco Borg, Ingmar Spiteri, Alan Camilleri og Clayton Pisani
**1-0:** Stefan Maierhofer 1.
**2-0:** Marc Janko 16.
**3-0:** Mark Janko br 59.
**3-1:** Andreas Lava Olsen 83.
**Eysturríki:** 1. Helge Payer – 3. Franz Schimer, 2. Aleksandar Dragovic, 4. Jürgen Patocka (18. Manuel Ortlechner, 46.), 5. Christian Fuchs - 13. Andreas Hölzl, 6. Yasin Pehlivan, 8. Daniel Beichler (7. Roman Wallner, 80.), 10. Jakob Jantscher - 11. Stefan Maierhofer (9. Erwin Hoffer, 61.), 17. Marc Janko, liðformaður
**Gult kort:** Marc Janko 52., Roman Wallner 88.
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Andreas Svhranz, 14. Gyorgy Garics, 15. Christopher Trimmel, 16. Julian Baumgartlinger
**Venjari:** Dietmar Constantini
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, liðformaður, 64/-145, KÍ – 2. Jónas Þór Næs, 9/0, Frem, 4. Atli Gregersen, 3/0, Víkingur, 5. Egil á Bø, 9/0, EB/Streymur, 3. Einar T. Hansen, 7/0, NSÍ – 11. Bogi A. Løkin, 9/1, NSÍ, 7. Fróði Benjaminsen, 54/3, HB (17. Jann Ingi Petersen, 14/0, NSÍ, 81.), 9. Súni Olsen, 36/2, Víkingur (15. Levi Hanssen, 2/0, EB/Streymur, 68.), 6. Atli Danielsen, 33/0, KÍ, 8. Símun Samuelsen, 25/1, Keflavík – 10. Christian Lamhauge Holst, 16/2, Silkeborg IF (12. Andreas Lava Olsen, 2/1, 82.).
**Gult kort:** Atli Danielsen 52., Fróði Benjaminsen 55., Einar Hansen 63. og Bogi Løkin 69.
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 13. Bartal Eliasen, 5/0, ÍF, 14. Jákup á Borg, 58/2, B36, 16. Gunnar Nielsen, 1/0, Manchester City, 18. Jóan Simun Edmundsson, 1/0 B68
**Aðrir spælarar í ferðalagnum:** Jóhan Troest Davidsen, 12/0, NSÍ, og Brian Olsen, 0/0 EB/Streymur
**Venjari:** Brian Kerr
**Hjálparvenjarar:** Jens Martin Knudsen og Abraham Løkin